

Eldar Sætre, aðalstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil skal spara enn meir í næstum

**Jógvan Hugo Gardar**

06.02.2015 - 06:43

Oljan.fo

Í morgun skal Eldar Sætre á fyrsta sinni sum aðalstjóri í Statoil, leggja fram roknskapartølini fyri íleggjarum og øðrum áhugaðum.

Fyri løtu síðani bleiv rokniskapurin almennur, og Statoil boðar í honum frá at rakstrarúrslitið fyri seinasta ársfjórðingin í 2014 gjørdist 26,9 milliardir norskar krónur. Tað er eitt munandi lægri rakstrarúrslit samanborið við sama ársfjórðing í 2013, tá úrslitið gjørdist 42, 3 milliardir krónur. Høvuðsorsøkin tykist at vera lági oljuprísurin.

Sparingarnar sum Statoil setti í gongd í 2014 eru bara byrjanin. Rakstrarúrslitið minkaði við næstan 30 milliardum krónum fyri alt 2014.

- Fjórði ársfjórðingur er merktur av tí stóra fallinum í oljuprísinum. Harafturat er úrslitið merkt av ávísum postum í roknskapinum, sigur Eldar Sætre, aðalstjóri í Statoil.

Statoil setti í verk eina spariætlan fleiri mánaðir áðrenn oljuprísurin fór at lækka, og hóast hendan ætlanin tyktist krevjandi, so røkist fyri at meir skal sparast. Men Statoil fyrireikar seg eisini til at økja um framleiðsluna næstu árini. Millum annað hevur Statoil selt partar av sínum íløgum í oljuøkir í USA, men skal økja um íløgurnar á norska landgrunninum.

Eldar Sætre, sum bleiv settur í starv sum aðalstjóri í hesi vikuni, hevur ikki lagt fram nakra nágreiniliga ætlan fyri hvat hann ynskir at gera við Statoil, men tað liggur í kortinum at hann kemur at hava meir fokus á norska landgrunnin.